# Jógvan er poppstjørna í Íslandi

**- Eg vænti ikki, at Jógvan heldur leingi í X-Factor, úrslitini verða avgjørd við sms-atkvøðum, og tá hevur ein, ið ikki er íslendingur ikki nakran møguleika. Men Jógvan er longu vorðin eitt kent andlit her, og longu ein poppstjørna í Íslandi, sigur íslendski Føroya vinurin Jens Guð.**

X-FACTOR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




Fríggjakvøldið sang føroyski Jógvan Hansen seg víðari í íslendsku sangkappingini The X-Factor. Hetta er best umtókta sjónvarpssending í Íslandi nakrantíð, og sambært Føroyavininum Jens Guð, er Jógvan longu eitt kent andlit í Íslandi.

- Hetta er fyrsta árið at vit hava X-Factor í Íslandi, men sendingin er longu sera væl umtókt. Vit hava áður hava Idols kappingar, og tá gjørdust 15 tey bestu hvørt árið popp stjørnur í Íslandi. X-Factor er uppaftur betri umtókt enn Idols. Jógvan kann tí longu nú, uttan trupulleikar geva eina fløgu út sum einstaklingur, hetta eisini um hann ikki kemur longur enn hetta í kappingini, sigur Jens Guð.

- Jógvan er sera, sera vælumtóktur í Íslandi. Dómsnevndin nevndi fleiri ferðir, at hann er sær so gott út, tá hann framførur, harumframt syngur hann eisini væl.

Jógvan Hansen er í Føroyum best kendur sum sangari í rokk bólkinum Aria, og av útgávunum hjá Kularrótum. Jógvan hevur seinastu árini búð í Íslandi, har hann er útbúgvin frisør, og rekur egna hárfríðkanarstovu í Borgartúnii 29 í Reykjavík.

Higartil hevur ein dómsnevnd við teimum trimum kendu íslendingunum Páll Óskari, Einari Bárðasyni og Ellý gjørt av hvør kemur víðari í X-Factor kappingini, men frá fríggjakvøldinum, byrjaðu beinleiðis sendingarnar. Nú gevur dómsnevndin sína meting, men tað eru sms-atkvøður, ið hava seinasta orðið og avgera hvør kemur víðari í sendigini.

- Í sendingini fríggjakvøldið gjørdist Jógvan nummar 10 av teimum 12, ið luttaka. Tað er greitt, at sum føroyingur, hevur hann ikki nakran serligan møguleika at koma langt. Eg vænti stutt sagt ikki, at Jógvan heldur nógv longri enn hetta í X-Factor. Tá úrslitini verða avgjørd við sms-atkvøðum, hevur ein, ið ikki er íslendingur ikki nakran møguleika, Um tú tildømis er av Hafnarfirði, so atkvøða øll, ið eru av tí leiðini fyri tær. Hetta baklandi hevur Jógvan sjálvandi ikki, tí verður sera trupult hjá honum at koma langt.

Starvslýsing

Heimatænastan

## Heilsuhjálpari til Heimatænastuna Vágoy/Norðstreymoy

Søkt verður eftir heilsu-/heimahjálpara at arbeiða í Vágum at byrja 1. mars ella skjótast til ber. Talan er um blandaðar dag- og kvøldvaktir við starvsbrøki 25 tímar um vikuna.
Talan er um tíðaravmarkað starv fram til 1. september 2007 við møguleika fyri longdari setan.

- Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í eini skipan, sum er í støðugari menning. Eitt starv, har tú bæði fert at virka í tøttum samstarvi við onnur og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
- Uppgávur tínar verða, umframt at veita handaliga hjálp, eisini at veita hjálp til persónliga røkt til heimabúgvandi pensjonistar.
- Tað er ein fyrimunur, um tú hevur prógv sum heilsuhjálpari ella hevur royndir innan eldrarøkt.
- Vit vænta av tær, at tú bæði hevur góð samstarvsevnir og hevur áræði at arbeiða sjálvstøðugt.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Malan Helgadóttir, økisskrivara, á tlf. 333249/226888.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Heimatænastan Vágoy/Norðstreymoy.

**Umsókn:**
Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum/arbeiðsváttanum skal sendast til:
Heimatænastan Vágoy/Norðstreymoy
Økisskrivsstovan
FO 370 Miðvágur
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari

**Umsóknarfreist:**
Týsdagin 13. februar 2007

**Les meira um starvið á www.naerverk.fo/ leys størv**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

## Um X-Factor:

X-Factor er tónleikakapping, ið er ment av Simon Cowell høgt elskaða og hataða dómaranum úr amerikansku Idols sendingini.
Kappingin hevur gingið sína sigursgongd í Bretlandi, har hon slóg øll met øll trý árini, ikki færri enn 10.000.000 hyggjarar fylgdu við, m.a. tí , at í dómsnevndini eru Simon Cowell og Sharon Osbourne, umframt tann minnið navnframa Louis Walsh. Tá sendingin herfyri var send triðja árið, høvdu ikki færri enn 100.000 fólk melda seg til hana.
Í X-Factor eru tey, ið kappast býtt upp í 3 bólkar, sangarar í aldrinum 16-25 ár, sangarar yvir 25 ár og bólkar.
Kappingin er býtt í 4 partar, royndir, venjingarlega, vitjanir heima hjá dómarum og beinleiðis sendingar.

**Vinningurin er í Bretlandi £1.000.000.**

Í Íslandi er X-Factor longu størst sjónvarpssuccesssin nakrantíð. Hon verður send á Støð 2, og í løtuni eru tey farin undir beinleiðis umførini.